**LM-060/2025**

# Fíggjarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 3. desember 2025 |
| Mál nr.: | 25/32242 |
| Málsviðgjørt: | JEK/BAB |
| Ummælistíð: | N/A |
| Eftirkannað: | 3. desember 2025 |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjaldslógin)**
(Leingja heimildina at endurrinda meirvirðisgjald í sambandi við bygging og umbygging av ávísum leigubústøðum)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjaldslógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 11 frá 7. mars 2024, verður í § 3 b, stk. 2, nr. 4 "31. desember 2025" broytt til: "31. desember 2030".

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað frá 1. januar 2026.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Uppskotið hevur til endamáls at leingja heimildirnar at endurrinda meirvirðisgjald í sambandi við bygging/umbygging av ávísum leigubústøðum.

Verandi ásetingar, sum allar eru tíðaravmarkaðar til 31. desember 2025, verða við uppskotinum longdar til 31. desember 2030.

Landsstýrið arbeiðir við einum bústaðarpakka og í hesum sambandi verður skipanin við at endurrinda meirvirðisgjald í sambandi við bygging av leigubústøðum væntandi endurskoðað.

### 1.2. Galdandi lóggáva

*Endurgjald sambært § 3b (leigubústaðir)*

Tey, sum byggja ella umbyggja ein bygning til leigubústaðir fyri meira enn 200.000 kr., mvg ikki íroknað, kunnu fáa endurgoldið inngangandi meirvirðisgjaldið av byggikostnaðinum.

Treytirnar fyri at fáa endurgoldið meirvirðisgjaldið eru:

- at talan er um í minsta lagi tveir leigubústaðir, harav í minsta lagi 10%, tó minst ein bústaður, skal verða atkomiligur og kunna nýtast av fólki í koyristóli,
- at matrikulnummrið, har leigubústaðirnir verða bygdir ella umbygdir, ikki hevur við sær lán, har rentustuðul verður veittur.

Arbeiðið, sum meirvirðisgjald kann verða endurgoldið fyri, skal vera endað í seinasta lagi fimm ár eftir, at umsóknin er góðkend.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at eggja persónum og fyritøkum at byggja/umbyggja bygningar til leigubústaðir.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við uppskotinum verður skipanin um afturbering av meirvirðisgjaldi í sambandi við bygging/umbygging av bygningum til leiguíbúðir longdar.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið hevur ikki verið í almennari hoyring.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Inntøkurnar frá meirvirðisgjaldi fella til landskassan, og tí er tað landið, sum ber kostnaðin, tá meirvirðisgjald verður afturrindað.

Síðani 2020 eru endurrindað sambært talvuni niðanfyri.

Uppgerð yvir endurgjald til bygging av leigubústøðum frá 2020 til 2025 (dd) (3. kv. 2025)

| | |
|---|---|
| 2020 | 32.398.827 kr. |
| 2021 | 5.429.224 kr. |
| 2022 | 48.311.177 kr. |
| 2023 | 71.980.436 kr. |
| 2024 | 29.922.084 kr. |
| 2025 | 10.477.730 kr. |
| **Tilsamans** | **198.519.478 kr.** |

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
TAKS umsitur í dag afturberingarskipanina tí hevur hettar uppskotið ikki meira umsiting við sær.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Uppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri vinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Uppskotið hevur jaligar sosialar avleiðingar, eftirsum uppskotið viðvirkar til, at útboðið av leigubústøðum, herundir bústøðum, sum eru atkomiligir og kunnu nýtast av fólki í koyristóli, økist.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Tað er ikki kendir millumtjóðarsáttmálar á økinum, sum Føroyar eru partar av.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**

1) **Hoyvíkssáttmálin**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri Hoyvíkssáttmálan.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar við atliti at EMRS.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**

Uppskotið hevur ongar avleiðingar við atliti at sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

**2.9. Markaforðingar**
Uppskotið hevur ikki við sær markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir og ger heldur ikki onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið ber í sær endurrindan av meirvirðisgjaldi í sambandi við bygging/umbygging av ávísum leigubústøðum.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Uppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

**2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Ja |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Ja | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**

**§ 1, nr. 1**
Við uppskotinum verður verandi skipan um afturbering av meirvirðisgjaldi til tann, sum byggir/umbyggir bygning til leigubústaðir fyri meira enn kr. 200.000, meirvirðisgjald ikki íroknað, longd til 31. desember 2030.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

Fíggjarmálaráðið, 3. desember 2025

**Ruth Vang**
landsstýriskvinna

/ Bjarni Askham Bjarnason

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur